umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

sambært kapittul 5 í Ll. nr. 134 frá 1988 um umhvørvisvernd

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| Sp/F 12-08-09 | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Monteringskaiin, Skála havn | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At høgga bátar og skip upp og annað virksemið í hesum sambandi | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| Skála havn | 582794 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 11/00169-62 | 15-04-2015 |

Argir, hin 10/4-2015

Suni Petersen, deildarleiðari

Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

# Innihaldsyvirlit


1 Umsóknin ..... 2

2 Góðkenning og heimild ..... 2

3 Lýsing av virkseminum ..... 2

4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ..... 3

4.1 Goymslur ..... 4

4.2 Burturkast ..... 4

4.3 Spillivatn og regnvatn ..... 4

4.4 Útlát til luft ..... 5

4.5 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós ..... 5

5 Málsviðgerð ..... 5

6 Góðkenningartreytir ..... 6

6.1 Almennar treytir ..... 6

6.2 Innrætting og rakstur ..... 7

6.3 Goymslur og burturkast ..... 8

6.4 Spillivatn og regnvatn ..... 9

6.5 Útlát til luft ..... 10

6.6 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós ..... 10

6.7 Óhapp ..... 11

6.8 Innaneftirlit og umhvørvisstýriing ..... 11

6.9 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing ..... 12

7 Kæruvegleiðing ..... 13

## 1 Umsóknin

Tann 21. Februar 2011 fekk Umhvørvisstovan umsókn frá Sp/F 12-08-09 um umhvørvisgóðkenning til upphøgging av skipum og bátum. Av tí at umsóknin ikki var nóg fullfíggjað, hevur Umhvørvisstovan biðið um eyka upplýsingar í fleiri umførum.

Í viðgerðini av umsóknini og til áseting av treytum er m. a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn dagfest hin 21-02-2011
- Ískoytistilfar til umsóknina
- Fundur millum Runavíkar kommunu og vitjan á Skála havn hin 07-01-2014
- Fundur millum Runavíkar kommunu, Runavíkar havn, Sp/F 12-08-09 og Umhvørvisstovuna hin 04-11-2014
- Enskt tilfar um líknandi virksemi
- Umhvørvisgóðkenning av líknandi virksemi í Danmark

## 2 Góðkenning og heimild

Henda umhvørvisgóðkenning av Sp/F 12-08-09 til virksemi á Skála Havn á útfylling norðanfyri Monteringskaina, givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

## 3 Lýsing av virkseminum

Ein partur av virkseminum fer fram umborð á bátum/skipum, sum liggja við norðaru síðu av Monteringskaiini á havnarlagnum á Skála (Mynd 1), og ein partur á øki norðan fyri Monteringskaiina, uttan fyri matr. nr. 224b, sum táverandi Skála kommuna hevur fylt út, og nú verður umsitið av Runavíkar havn (hereftir nevnt: útfyllingin).

Bátar ella skip liggja trygt bundin við Monteringskaiina á Skála. Byrjað verður at rigga bátin/skipið av omandeks, soleiðis at stabiliteturin altíð er góður. Alt tilfar verður skilt sundur í hóskandi bólkar og fingið í land um landgongd, sum verður gjørd millum skip og útfylling. Roynt verður at skilja soleiðis, at mest møguligt kann endurvinnast ella endurnýtast. Jarn og metal verður fylt upp í bingjur og selt so hvørt. Motorar og ymisk onnur útgerð, sum kann endurnýtast, verður løgd á goymslu hjá Sp/F 12-08-0ð í Skálafirði og síðani selt.

Burturkast av ymsum slag, so sum timbur, plast, bjálving, spillolja og annað serliga dálkandi burturkast verður sent til móttakara, sum hevur góðkenning til at taka ímóti og viðgera viðkomandi burturkast. Olja og spillolja verður pumpað úr skipinum í plasttangar á landi og dieselolja brúkt til



Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

arbeiðsmaskinur á staðnum. Oljusperra verður løgd rundan um skipið, tá olja verður tikin upp. Akkumulatorar verða savnaðir í uppskorðin plastíløt og seldir av landinum.

Allir størri lutir, bæði timbur og metal, verða kliptir sundur við maskinsaksi. Tá alt er tikið innan úr minni skrokki (úr timbri ella glæstrevjum), verður hann drigin upp á útfyllingina norðanfyri bryggjuna og kliptur sundur. Klipta tilfarið verður koyrt í bingjur og sent til móttakara, sum hevur góðkenning at taka ímóti og viðgera burturkastið.

Størri skip úr stáli verða skorin sundur so langt niður sum gjørligt, meðan tey liggja við bryggju. Síðani verður botnskrokkurin drigin upp og kliptur sundur so hvørt.

Barlastbetong, verður brotin leyst og tyrvd á moldgoymsluni hjá kommununi.

# 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Upphøgging av skipum fer fram á havnarlagnum á Skála. Skipini liggja við norðursíðuna av Monteringskaiini og tilfar og burturkast verður tikið upp á útflyllingina á norðursíðuni á Monteringskaini. Økið er D20-24 í byggisamtyktini fyri Runavíkar kommunu, ætlað til havnarendamál og líknandi vinnuvirki, m.a. skipasmiðjur og umvæling av skipum og veitingarvirksemi í sambandi við sjóvinnu.

Virksemið hevur onga beinleiðis framleiðslu, men lutar bátar og skip sundur í upprunalutir.




Mynd 1. Virksemið skal vera innanfyri bláu avmerkingina.

Mannagongdin er, at báturin/skipið verður tikið sundur stykki fyri stykki, soleiðis at mest møguligt av tilfarinum kann brúkast aftur, antin beinleiðis ella endurvinnast. Lutir verða loystir við hóskandi amboðum og skyldir í tilfarsbólkar.

Í hesari góðkenning verður skilt ímillum:

- Tilfar: evni ella lutur, sum kann endurnýtast ella endurvinnast
- Burturkast: evni ella lutur, sum ikki kann endurnýtast ella endurvinnast, men skal beinast burtur á hóskandi góðkendan hátt.
- Serliga dálkandi burturkast: akkumulatorar, kemikaliir, máling, oljur, ljósrør, battarí, v.m.

## 4.1 Goymslur

Ein stórur partur av virkseminum er at skilja tilfar í ymsar bólkar. Talan er um tól, lutir, metal, elektronikk og annað, umframt burturkast.

Hóskandi goymslur eru bingjur, tangar, kassar og onnur íløt, sum eru í góðum standi og góðkend til at goyma ella flyta tilfar ella burturkast við.

Í kap. 6.2 um Góðkenningartreytir, verða treytir settar um innrætting og rakstur, og í kap. 6.3 verða treytir settar um, at tað altíð eru hóskandi bingjur og onnur íløt tøk til tilfar og burturkast, sum verður tikið av skipunum og bátum .

## 4.2 Burturkast

Í sambandi við upphøgging av bátum og skipum eru stórar nøgdir av tilfari, sum timbur og glastrevjar, sum skulu beinast burtur.

Annað burturkast kann vera bjálving av ymsum slag, asbest, serliga dálkandi burturkast, sum oljur, kemikalii, akkumulatorar, ljósrør, battarí og ymsar leivdir frá fyrrverandi skiparakstri.

Treyt verður sett um, at burturkast verður handfarið og skilt sambært kunngerð um burturkast, og treytunum hjá umhvørvisgóðkendum móttakara av burturkasti og annars eftir vegleiðingum frá Umhvørvisstovuni[1].

Treyt verður sett um, at burturkast ikki liggur ella stendur á arbeiðsøkinum, men altíð er í hóskandi bingjum ella íløtum.

## 4.3 Spillivatn og regnvatn

Av tí at nógv av tilfarinum, sum verður tikið av skipum, er dálkað, verður økið kring virksemið dálkað. Tá alt virksemið er uttandura, og havnarlagið ikki hevur reinsiskipan, fer dálkandi tilfar á sjógv við regnvatni.

Harafturat kann olja renna á sjógv í sambandi við, at bæði dieselolja og smyrjiolja verður pumpað í land.

Útfyllingin norðanfyri Monteringskaiina hevur ikki fastan og tættan arbeiðsvøll, so væta, olja og kemikaliir seyra ígjøgnum beinleiðis á sjógv.

Í kap 6.3 verða treytir settar um, at bryggjan verður ruddað og reinsað, at rusk og smátilfar á bryggjuni verður savnað í tætta bingju eftir tørvi og minst einaferð um vikuna.

---

[1] Burturbeining av asbest, Umhvørvisstovan, Vegleiðing - 6/2010

Treytir verða eisini settar um, at oljur, kemikalii, akkumulatorar og líknandi dálkandi tilfar skal latast í tøtt íløt við loki, so hvørt tey verða tikin í land.

Treyt verður sett um, at virki hevur mannagongdir í sambandi við pumping av olju.

## 4.4 Útlát til luft

Tá virkið ikki hevur eina beinleiðis framleiðslu, eru bert skiftandi útlát til luft frá skeribrenning, makinslíping, arbeiðsmaskinum og líknandi virksemi.

Harafturat kann útlát koma fyri í sambandi við, at sløkkiútgerð og køli- ella frystiútgerð verður tømd. Í gomlum skipum kunnu hesi evni vera s ozonoyðandi og heilsuskaðilig.

Í kap. 6.5 verða treytir settar um, at sløkkiútgerð og køli/frystiútgerð verða avriggað av persóni ella virki við neyðugum førleika og útbúnaði.

## 4.5 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós

Óljóð stavar frá arbeiðsmaskinum, maskinslíping, banking og at tilfar verður slept niður í bingjur. Hetta er líknandi ljóðmynd, sum stavar frá øðrum virksemi á havnarlagnum.

Í kap. 6.6 verða treytir settar um, at virkið leggur arbeiðið soleiðis til rættis, at tað larmar sum minst, og at virksemið heldur almennu treytirnar um óljóð frá virksemi.

# 5 Málsviðgerð

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at dálkandi evni ikki verða leidd út í Skála Havn og umhvørvið annars
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt
- at virkið hevur mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum
- at útgerð at handfara dálkandi óhapp er tøk
- at virkið avmarkar óljóð mest møguligt
- at besta tøka tøknin, sambært BAT[2]-hugtakinum, verður nýtt í mest møguligan mun
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum.

Umhvørvisstovan sendi hin 3. mars 2014 upppskot til umhvørvisgóðkenning til hoyringar hjá Sp/F 12-08-09, Runavíkar kommunu, MEST og Runavíkar havn.

Út frá viðmerkingunum (sí niðanfyri) metti Umhvørvisstovan ikki, at Sp/F 12-08-09 kundi fáa umhvørvisgóðkenning, og heitti hin 24-09-2014 á Runavíkar kommunu, um at viðgera og taka støðu til viðmerkingarnar, sum eru lýstar niðanfyri. Hin 04-10-2014 var fundur við Runavíkar kommunu, Runavíkar havn og Sp/F 12-08-09 um viðmerkingarnar og niðurstøðuna.

[2] **Best Available Techniques (BAT)**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

MEST vísir á, at skipasmiðjan hevur sáttmála við Runavíkar kommunu um matr. nr. 224a og 224b, og at ein partur av matr. nr. 244a er partur av útfyllingini á norðursíðuni á bryggjuni, har Sp/F hevur sítt virksemi. MEST vil hava greiðar ábyrgdarlinjur fyri útfylta økið norðanfyri bryggjuna. Umhvørvisstovan tekur undir við hesum og avmarkar virksemið hjá Sp/F 12-08-09 til at vera uttan fyri leigaða øki hjá MEST á Skála.

Runavíkar havn vísir á, at Sp/F 12-08-09 ikki hevur sáttmála um bryggjuna og atløgusíðuna, men at felagið rindar brúgvargjald fyri at taka skip upp, og at Runavíkar havn ræður yvir bryggju og atløgusíðu fult og heilt. Verður bryggjan gird inni, skal girðingin kunna takast burtur, so títt og knapt tað er tørvur á tí. Annars vísir havnarmeistarin á, at eitt krav átti at verið, at net skal kunna spennast yvir bingjurnar, so tilfar ikki kann fúka. Á fundinum við Runavíkar kommunu hin 04-11-2014 varð avtalað, at Runavíkar havn útflýggjar Umhvørvisstovuni avrit av avtalu millum Sp/F 12-08-09 og havnina.

Sp/F 12-08-09 hevur ynski um, at kunna høgga størri skip upp, enn tað sum verður nevnt í uppskoti til umhvørvisgóðkenning. Á fundinum við Runavíkar kommunu hin 04-11-2014 metti havnameistarin at skip upp til 50 metur kunnu liggja trygt við bryggjuna. Umhvørvisstovan tekur undir við, at Sp/F 12-08-09 kann viðgera skip upp til 50 metrar.

# 6 Góðkenningartreytir

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.

6.1.2 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa broyting.

6.1.3 Um virki skiftir eigara, broytir navn ella verður tikið av, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta.

6.1.4 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð uttandura antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja at olja, kemikalii ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunna dálka umhvørvið meðan virkið liggur stilt.

6.1.5 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av, umframt at treytirnar í 6.1.6 verða settar í verk so skjótt sum gjørligt.

6.1.6 Allar treytir eru eisini galdandi fyri virksemi hjá veitarum, meðan teir arbeiða á virkinum.

6.1.7 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.8 Sp/F 12-08-09 rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum

6.1.9 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.10 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir,
- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkenningin varð givin.

6.1.11 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað ella um minni dálkandi framleiðsluhættir ella betri reinsingarhættir eru komnir fram.

## 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Henda góðkenningin loyvir Sp/F 12-08-09 at høgga bátar og skip upp, sum eru styttri enn 50 metrar.

6.2.2 Eftir umsókn kann Umhvørvisstovan geva loyvi til at víkja frá hesum treytum í serligum førum.

6.2.3 Tætt tilfar, t.d. asfalt ella betong, skal leggjast á útfyllingina og annars alt lendi, sum henda góðkenning viðvíkur, soleiðis at spillvatn ikki seyrar niður ígjøgnum hana ella fer upp um forðandi bryggjukant.

6.2.4 Virksemið skal skipast soleiðis, at havnarlag, fjørður og umhvørvið annars ikki verður dálkað av hesum.

6.2.5 Tilfar og burturkast[3] skulu goymast í íløtum sum eru fest, so tey ikki fúka, og gird ella lokað soleiðis, at tilfar og burturkast ikki fýkur úr teimum.

6.2.6 Serliga dálkandi burturkast skal vera í íløtum, búrum ella líknandi, soleiðis at óviðkomandi ikki kunnu koma at burturkastinum, og annars standa á avmarkaðum øki við tøttum undirlag.

6.2.7 Umhvørvisstovan kann krevja, at økið skal girðast inni við tveimum metra høgum hegni og skal kunna læsast fyri óviðkomandi.

6.2.8 Vælvirkandi oljusperra skal liggja um bát ella skip, so leingi olja og kjalarvatn er umborð.

[3] Í hesari góðkenning verður skilt ímillum: (1) Tilfar: evni ella lutur, sum kann endurnýtast ella endurvinnast, (2) Burturkast: evni ella lutur, sum ikki kann endurnýtast ella endurvinnast, men skal beinast burtur á hóskandi góðkendan hátt, (3) Serliga dálkandi burturkast: akkumulatorar, kemikaliir, máling, oljur, ljósrør, battarí, v.m.

6.2.9 Umhvørvisstovan skal hava fráboðan um upphøgging av skipum, sum eru longri enn 25 metrar minst 14 dagar frammanundan, at farið verður at høgga tey upp.

6.2.10 Bert eitt skip longri enn 25 m kann høggast upp samstundis.

6.2.11 Sp/F 12-08-09 skal tryggja sær, at skrokkar hava góðan stabilitet, ímeðan teir verða høgdir upp.

6.2.12 Sp/F 12-08-09 skal tryggja sær, at hol ikki kemur á skrokk niðanfyri vatngangin ella at skrokkur fyllist við vatni ella sjógvi á annan hátt.

6.2.13 Sp/F 12-08-09 skal byrgja fyri, at tilfar av bátum og skipum dettur á sjógv í sambandi við virksemið.

6.2.14 Skrokkar mugu ikki dragast upp fyrr enn alt, sum kann loysast, er tikið innan úr teimum, umframt at kjalarvatn er sogið upp.

6.2.15 Ein hóskandi nøgd av oljusúgvandi og kemikaliisúgvandi tilfari skal altíð verða tøkt á økinum, so sum grús, máttur, pylsur o.l.

6.2.16 Hóskandi sløkkiútgerð skal altíð vera tøk á staðnum.

6.2.17 Alt tilfar skal skiljast soleiðis, at so nógv sum møguligt kann endurnýtast ella endurvinnast.

6.2.18 Økið skal vera skipað soleiðis, at tilfar at endurnýta ella endurvinna stendur fyri seg, burturkast fyri seg og serliga dálkandi burturkast fyri seg.

6.2.19 Økið verður ruddað og reinsað regluliga og í minsta lagi einaferð um vikuna, og rusk og smátilfar savnað í tætta bingju.

6.2.20 Millum hvørt farið skal økið ruddast og reinsast, og rusk og smátilfar burturbeint.

6.2.21 Alt økið, sum er avsett til virksemið í hesi góðkenning, skal lúka lúka treytirnar í hesi góðkenning í seinasta lagi 31-12-2015.

6.2.22 Miðast skal eftir at nýta bestu tøku tøknina til alt virksemið.

## 6.3 Goymslur og burturkast

6.3.1 Nóg mikið av hóskandi bingjum og íløtum til tilfar og burturkast, sum verður tikið í land, skulu altíð vera á økinum.

6.3.2 Á økinum á havnarlagnum á Skála skal ikki vera meira tilfar at endurvinna ella endurnýta enn tað, sum kann vera í hóskandi íløtum.

6.3.3 Alt burturkast skal handfarast og skiljast í samsvari við kunngerð um burturkast[4] og galdandi reglur hjá móttakara.

[4] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

6.3.4 Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti tí og viðgera tað.

6.3.5 Burturkast skal altíð goymast í íløtum ella bingjum, sum hóska til endamálið, og skal standa soleiðis, at møguligt spill verður leitt í kloakk við reinsiskipan ella savningarbrunni,so tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.3.6 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í hóskandi góðkendum íløtum, t.d. UN-merktum íløtum, sum eru merkt á góðkendan hátt.

6.3.7 Íløt til serliga dálkandi burturkast, sum standa úti, skulu vera vind og vatntøtt. Tey skulu standa á einum sjálvstøðugum avbyrgdum tøttum øki.

6.3.8 Nøgdin av burturkasti og serliga dálkandi burturkasti á økinum á havnarlagnum á Skála skal ikki vera meira enn tað, sum kann vera í størsta hóskandi ílatinum.

6.3.9 Íløt við loki til akkumulatorar[5] og elektronikk til endurvinning skulu vera vatntøtt. Tá hesi eru full, skulu tey antin latast til móttakara, sum hevur góðkenning til at taka ímóti og viðgera tað, ella flytast á goymslu, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at hava nevnda burturkast á goymslu.

6.3.10 Brúktir akkumulatorar og serliga dálkandi burturkast, sum verða útflutt beinleiðis, eru at rokna sum vandamikið góðs og skulu útflytast sambært millumlanda flutningsreglum.

6.3.11 Barlastbetong skal endurnýtast, har tað er gjørligt. Annars skal tað beinast burtur í samráð við kommunala mynduleikan.

## 6.4 Spillivatn og regnvatn

6.4.1 Spillivatnið frá útfyllingini skal leiðast ígjøgnum hóskandi reinsiskipan við 5 mm sílu og t.d. botnfellingartanga og oljuskiljara, áðrenn tað verður leitt á sjógv.

6.4.2 Spillivatnssýni úr sýnistøkubrunni eftir oljuútskiljara, skulu í minsta lagi lúka markvirðini, sum eru ásett í 6.3.6.

6.4.3 Oljuskiljarin skal hava ávaringarskipan og sjálvvirkandi læsing, tá hann er hóskandi fullur.

6.4.4 Sýnistøkubrunnur, ið ger tað møguligt at taka sýni av reinsaða spillivatninum, skal vera eftir reinsiskipan.

6.4.5 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðingina.

6.4.6 Um kommunal spillivatnskipan ikki er tøk, skal spillvatn leiðast út á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavning av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

---

[5] Akkumulatorar og annað serliga dálkandi burturkast til útflutnings skal skiljast, pakkast og merkjast sambært viðkomandi flutningsreglum.

6.4.7 Munnin á spillvatnsútleiðing skal í minsta lagi verða ein metur undir størstu fjøru.

6.4.8 Elvir spillvatnsútleiðing til uppsavning av evnum og tilfari í sjóarmála ella á botni, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir fremjast, so sum økt reinsing. Umhvørvisstovan skal kunnast um ætlaðar atgerðir.

6.4.9 Um spillvatnssýni verða tikin úr sýnistøkubrunni eftir oljuútskiljara, skulu tey í minsta lagi lúka hesi markvirði

| Parametur | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Pb (Blýggj, mg/l) | 1,5 | DS/EN ISO 17294 ICP/MS |
| Cd (Cadmium, mg/l) | 0,1 | DS/EN ISO 17294 ICP/MS |
| Hg (Kyksilvur, mg/l) | 0,003 | DS/EN ISO 17294 ICP/MS |
| Mineralsk olja (mg/l) | 10 | DS/R 208 |
| pH | 6,5-9,0 | DS 287 |
| Nonylphenolethoxylat | | |
| Butylbenzylpthalat | | |

## 6.5 Útlát til luft

6.5.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av royki, lukti ella dusti uttan fyri økið virkisins.

6.5.2 Áðrenn køli- og frystiskipanir við ozonoyðandi evnum verða tikin niður ella burturbeind, skulu hesi tømast fyri nevndu evni av løggildum veitara sambært § 11 í kunngerð um ozonoyðandi evni[6].

6.5.3 Áðrenn sløkkiskipanir við ozonoyðandi evnum verða tiknar niður ella burturbeindar, skulu hesar avriggast og tømast fyri nevndu evni av av løggildum veitara sambært § 11 í kunngerð um ozonoyðandi evni[7] og vegleiðing[8] hjá Umhvørvisstovuni.

## 6.6 Óljóð, ristingar, geislingar og ljós

6.6.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum uttan fyri øki virkisins.

6.6.2 Ískoytið frá virkseminum hjá Sp/F 12-08-09 og beinleiðis avleiddum virksemið til óljóðtyngdina, máld sum tað orkujavnaða, A-vigaða ljóðtrýststøðið í dB(A) við næsta grannamark, má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk:

[6] Kunngerð nr. 118 í 2010 um ozonoyðandi evni.
[7] Kunngerð nr. 118 í 2010 um ozonoyðandi evni.
[8] Vegleiðing um niðurtøku av eldsløkkiskipanum við halóni, Umhvørvisstovan, Vegleiðing – 14/2012

| Dagur | Klokkutíð | Tímar | Øki 1 dB(A) | Øki 2 dB(A) | Øki 3 dB(A) | Øki 4 dB(A) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 06-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 06-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 06-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-06 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Tímar: Tíðarbil við hægsta miðal dB(A)

Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram

Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram

Øki 3: Blandað bústaðar- og Miðstaðarøki

Øki 4: Bústaðarøki

6.6.3 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirðir) í bústaðarøkjum (øki 3 og øki 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.

## 6.7 Óhapp

6.7.1 Har vandi er fyri spilli av olju ella øðrum dálkandi evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

6.7.2 Henda óhapp, sum kunnu hava umhvørvislig árin, skulu tiltøk beinanvegin setast í verk til at avmarka møguligar fylgjur og at taka dálkandi tilfar upp. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til uppruddíng v.m. sendast Umhvørvisstovuni[9].

6.7.3 Er neyðugt at seta serlig tiltøk í verk at fyribyrgja ella basa dálking, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta skjótast gjørligt.

## 6.8 Innaneftirlit og umhvørvisstýring

6.8.1 Sp/F 12-08-09 skal hava skrivligar mannagongdir fyri pumping av brennievni og spillolju úr bátum og skipum, sum verða høgd upp. Hesar skulu lúka treytirnar í kunngerð um bunkring av skipum[10]. Umhvørvisstovan skal hava avrit av hesum mannagongdum.

6.8.2 Virkið skal hava mannagongdir og útgerð til at taka upp eftir møgulig óhapp. Sp/F 12-09-09 sendir Umhvørvisstovuni avrit av hesum mannagongdum.

6.8.3 Skipanirnar til reinsing av spillivatni skulu tømast minst einaferð um árið, og tømingin skrásettast í rakstrardagbók.

---

[9] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

[10] Kunngerð nr. 84 í 2010 um bunkring, flutning av olju o.a.

6.8.4 Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð og ristingar verða hildnar.

6.8.5 Umhvørvisstovan kann krevja hóskandi skrivligar mannagongdir til dálkingaravmarkandi tiltøk, eftirliti, skráseting og handfaring av burturkasti.

6.8.6 Innan 12 mánaðir eftir at øki á útfyllingini er gjørt sum fyriskrivað omanfyri, skal Sp/F 12-08-09 taka seks sýni av spillvatninum frá økinum, sum verða kannað sambært 6.4.9. Úrslit og metingar av kanningunum skulu sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi ein mánað eftir at seinasta kanningin er tikin.

6.8.7 Umhvørvisstovan kann krevja at sýni verða tikin til kanningar av botninum kring Monteringskaiina á Skála og kannað fyri evnini í 6.4.9.

6.8.8 Umhvørvisstovan kann krevja, at botnurin kring Monteringskaiina á Skála verður kannaður og møguliga ruddaður fyri leivdir frá upphøgging av skipum.

6.8.9 Kanningar, sum eru ásettar í hesi góðkenning, kunnu broytast, herundir víðkast til onnur sýnissløg og fleiri parametrar um ábending er um serliga dálking ella fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

## 6.9 Rakstarskrásetingar og umhvørvisfrágreiðing

6.9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Yvirlit yvir skip eftir navni, havnarmerki, skipatilfari, skipastødd
- Avhendað tilfar, herundir útflutningur av tilfari, býtt upp í tilfarsbólkar, í tonsum ella kilo fyri hvønn bólk
- Yvirlit yvir móttakarar av tilfari
- Avskiping av burturkasti, býtt upp í bólkar, í tonsum, kilo ella $m^3$ fyri hvønn bólk
- Yvirlit yvir móttakarar av burturkasti
- Eftirlit og viðlíkahald av reinsiskipanum
- Tøming av reinsiskipanum til spillivatn, dato og móttakari
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi

6.9.2 Umhvørvisstovan skal til eina og hvørja tíð kunna síggja rakstrarskrásetingarnar, sum skulu goymast í 5 ár.

6.9.3 Sp/F 12-08-09 skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing við:

- uppgerð av rakstrarskrásetingum og lyklatølum,
- frágreiðing um umhvørviskanningar og umhvørvisviðurskifti við tulkingum,
- frágreiðing um viðlíkahald,
- óhapp og gjørd og ætlað umhvørvistiltøk.

Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum. Frágreiðingin fyri 2015 skal eisini innihalda rakstrarskrássetingar fyri 2013 og 2014.

# 7 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Avrit:** Runavíkar Kommuna,
Landslæknin, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.